gult cyan magenta svart


# ítróttur

Nr. 38 • fríggjadagur • 23. februar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


Kyndil–Tjaldur 23–23 (11–12)

## Tjaldur misti sensatiónina

**Í 56 minuttir og 9 sekund vóru tjaldurskvinnur oman á móti teimum hjá Kyndli, men í evstu løtu fekk havnarliðið kortini bjargað sær annað stigið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ikki mundu tað vera fleiri meiningar um, hvussu dysturin á Hálsi millum Kyndil og Tjaldur fór at spæla av. Hóast árið í ár ikki hevur roynst nakað serligt hjá Kyndli, so vóru tær í øllum førum risa favorittar at vinna dystin á Tjaldri, sum í sín lut enn eigur fyrsta sigurin í bestu deildini til góðar. Hetta hóast liðið nú hevur hálvt annað ár á baki í deildini. Hin vegin er ikki meira enn hálvt annað ár síðani, at Kyndil skuldi í holt við at verja FM heitið.

### Tær útlendsku stýrdu

Hetta tóktist tó ikki at vera nakað, sum tjaldurskvinnurnar hugsaðu um, tá dysturin byrjaði. Hóast saknurin á pappírinum var stórur í Beintu Joensen, sum fekk reytt kort seinast, so drivu tær á við fullari ferð frá fyrsta bríkslið.

Nú veit eg ikki um hetta er fyrstu ferð, men í øllum førum hevur Tjaldur sjáldan fingið eina slíka byrjan, meðan tær hava verið í fremstu deildini. Tað var eisini greitt, at spælararnir ressaðust av góðu byrjanini, og brádliga hoyrdist málageipan úti á vøllinum, har tær royndu at eggja hvørjari aðrari til at halda fast í leiðsluni.

Grundstuðlarnir í spælinum vóru fyrst og fremst tær báðar útlendsku, Milica og Jelena. Ikki minst er nú sjónligt, at Milica fær nógv meira burtur úr nú, hon ikki longur einsamøll skal bera álopsspælið hjá Tjaldri.

Tá hetta er sagt, skal tó eisini leggjast afturat, at Kyndil snorksvav tað mesta av fyrsta korterinum. Ikki minst kendist tað tungt hjá liðnum, at tær báðar, Lotte Sørensen og Ann Hansen, als ikki tóktust at vera komnar í snúningar, og millum annað gingu 22 minuttir, áðrenn Lotte fekk fyrsta »reina« málið. Jórun og Erla royndu at stríðast, men heldur ikki hjá teimum vildi spælið koyra, soleiðis sum tær vildu.

Seinastu løtuna undan steðginum fekk Kyndil tó betri tak á, og møguliga vórðu tær á útiliðnum tá eisini nakað moyrar. Í øllum førum fingu tær hesa løtuna minka munin niður í eitt mál, og so mundu áskoðararnir halda, at nú var sensatiónin av á hesum sinni.

### Sama byrjanin

Tjaldurskvinnurnar høvdu tó als ikki givið upp, bara tí Kyndil nú aftur var í hølunum á teimum. Við eini byrjan, sum var meinlík teirri í fyrra hálvleiki, løgdu tær aftur sjógv millum liðini, og greitt var nú, at Kyndil veruliga skuldi stríðast fyri at fáa nakað burtur úr dystinum.

Tað hoyrir tó eisini við til søguna, at eydnan so avgjørt ikki var við Kyndli hesa løtuna, og so slettis ikki við Lotte. Tvær reisur á rað støkk hon upp og langaði til, og báðu ferðirnar varð úrslitið hitt sama. Bólturin small í stólpan, og so kundu tær gulu fara í málgevandi kontraálop. Møguliga skuldi hetta eisini takast sum eitt tekin um, at runavíksgenturnar endiliga fóru at fáa teir væl kendu marginalarnir við í sín part, og í øllum førum kann staðfestast, at kyndilskvinnurnar vóru sera raskar at raka træverkið hendan dagin.

Seinastu 10 minuttirnar av dystinum fór Kyndil út í mansverju av teimum báðum útlendsku í eini seinastu roynd at venda dystinum. Tað var eisini skjótt greitt, at tað nú av álvara kom stígur í hjá Tjaldri. Í átta minuttir fekk Kyndil fýra mál móti ongum, og so stóð brádliga á jøvnum. Málverjin fekk nú eisini knappliga fatur á nøkrum skotum, og alt í alt kundi verið líkt til, at tær grønu skuldu megna at koppa øllum.

Tað eydnaðist tó Tjaldri enn eina ferð at leggja seg á odda, men 15 sekund fyri leiklok fekk Kyndil brotskast, og Lotte var ísakøld, tá hon langaði bóltin í meskarnar.

### Sigurin er ávegis

Javnleikur gjørdist sostatt úrslitið, og hóast favorittar, so munnu tær hjá Kyndli vera best nøgdar um hetta. Tær spældu so avgjørt ikki ein av sínum bestu dystum, og í veruleikanum er helst eisini langt síðani, at so var.

Ein av orsøkunum til, at tað ikki hevur gingist so væl hjá Kyndli hetta kappingarárið, er ivaleyst at finna í faldaranum, sum varð latin áskoðarunum til dystin. Har var mynd av fýra ungum barnakonum, sum nú allar eru vorðnar mammur (tillukku við tí!), og einki er at ivast í, at saknur er í leikarum sum teimum báðum málverjunum, Maritu og Elin, umframt vengrunum báðum, Palmu og Rakul. Hetta er tó neyvan øll frágreiðingin. Seinastu tvey árini hava væl og virðiliga sýnt, at skal eitt lið gerast føroyameistari, er neyðugt at styrkja um við hjálp av útlendingum. Tá hini gera tað, fært tú snøgt sagt ikki fylgt við uttan.

Hetta er so nakað av tí, sum Tjaldur hevur gjørt í ár, og tað tykist nú eisini greitt, at hetta fer at hjálpa teimum í royndunum at yvirliva í deildini. Hesa ferð fingu tær eisini stig burtur úr stríðnum, og ikki minst tað gera komandi dystirnar meira hugaligar at fara í holt við. At stríðsviljin er til staðar, er einki at ivast í, og nærum eins lítið er at ivast í, at fyrsti sigurin fer at koma innan heilt stutta tíð.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Lotte K. Sørensen 7(4), Jórun Ludvig 6, Erla H. Smith 5, Ann Hansen 3(1), Anita Kjærbo 1, Jensia Petersen 1
Tjaldur: Jelena Jevtevic 6(1), Milca Ergic 4, Mona Langgaard 4, Kristina Ellingsgaard 4, Ann Mari Østerø 2, Oddvá Fossdalsá 2, Turið Lamhauge 1
Brotskøst: Kyndil 6, Tjaldur 2
Útvísingar: Kyndil 1, Tjaldur 1
Dómarar úr StÍF: Pole Hansen og Justines Justinussen. Leikferðin var lág, og uppgávan tískil hampuliga løtt, og røktu teir eisini setningin, sum teimum varð litin til.



## Nicoleta breyt beinið

Síða 26



*So at siga allan dystin hevði Tjaldur gott tak á Kyndli, men í evstu løtu glapp sigurin teimum av hondum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



Kyndil–Tjaldur 37–25 (16–11)

## Reydligt á Hálsi

**Innan hálvan minutt fóru dómararnir fýra ferðir í lumman eftir reyða kortinum, men í aðrar mátar var talan ikki um tann stóra dramatikkin, tá Kyndil vann stórsigur á Tjaldri**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast runavíkingar mundu hava góðar vónir, tá teir fóru undir uppgávuna móti Kyndli, so var tað rættiliga skjótt, at heimaliðið gjørdu hesar væl meintu vónir til einkis. Eftir fáum minuttum vóru eini seks mál á muni, og eftir hetta gjørdist talan ongan tíð um nakran spennandi dyst.

### Bjarni í hopla

Tað, sum serliga var munurin millum liðini í fyrra hálvleiki, var, at kyndilsliðið var nógv betri skipað í verjupartinum enn gestirnir. At tjaldursmenn ikki tóktust leggja so nógv hendan partin av spælinum viðførdi eisini, at arbeiðsumstøðurnar hjá teimum grønu vóru væl betri, og serliga var tað Janus Einar, sum kundi gera sær dælt av hesum, meðan fríspælingarnar streymaðu inn til hansara frá teimum trimum bakspælarunum.

Har umframt hevði Kyndil so eisini tann fyrimunin, at Bjarni Wardum var í tí heilt góða lagnum hesa løtuna, og tá so er, kann tað snøgt sagt verða líka mikið, hvør tað er, sum verjir mótstøðumálið. Bjarni fær hasi har 10-15 málini, og so er bara at vóna, at liðfelagar hansara ikki fáa so nógv burtur úr.

### Kyndil stýrdi

Seinna umfarið høvdu gestirnir fingið betri tak á verjupartinum, og vóru teir nú betri førir fyri at fylgja við kyndilsmonnunum, soleiðis at munurin ikki øktist óneyðuga nógv.

Partvíst komst hetta tó eisini av, at Kyndil nú í nógv størri mun spældu kontrollerað. Teir høvdu vunnið sær eina hampuliga trygga leiðslu, og heldur enn at satsa í royndunum at økja um hesa, royndu teir at stýra spælinum. Eitt sindur harðliga kann kanska sigast, at teir lótu Tjaldri gerast betri, og í vanda kom sigurin so ongantíð.

Seinasta korterið tóktist tó, at orkan hjá Tjaldri var uppi, og so kundu kyndilsmenn ferð eftir ferð gera sær dælt av, at teir í nógv størri mun vóru førir fyri at seta leikferðina upp. Í løtum góvu teir tekin um, at teir aftur eru um at finna kvika álopsspælið frá grundspælinum aftur, men bakgrundin hesa ferð var eisini heldur bílig, so enn ber illa til at staðfesta, um teir aftur eru um at røkka tí støðnum.

### Ein reyður minuttur

Tað, sum dysturin helst serliga verður mintur fyri, er tað, sum fyrifórst á vøllinum, tá einir átta minuttir vóru eftir at leika.

Fyrst var Regin Petersen óneyðuga harðligur, tá hann jarðlegði Mortan Hansen, sum var púra leysur í einum kontraálopið. Allar helst átti talan at verið um beinleiðis reytt, men tá talan var um triðju útvísing hansara, kom reyða kortið allíkavæl fram. Sveinur í Heiðunum var somikið ónøgdur um, at talan ikki var um beinleiðis reytt, at hann megnaði at mótmæla seg til sína triðju útvísing, so hann eisini fekk ostaskorpuna.

Brotskastið, sum spurdist burtur úr hendingini gjørdi Zoran ikki mætari enn at sena beint í skortin á Jens Skipagøta, og so varð hann eisini tveittur út, og tá Kyndil so aftur fór í álop, fekk nýggi jugoslavin hjá Tjaldri, Dejan Macict, sína triðju útvísing. Ilt er annars at meta, hvussu stórur styrkur hesin nýggi leikarin verður hjá Tjaldri. Kvikleikan og bóltførleikan tykist hann at hava, men hesa ferð fekk hann so ikki prógvað, um gjøgnumbrotsstyrki hansara er nóg stór. Talan er tó bert um fyrsta dyst hansara fyri felagið, so hóast reyða kortið, kann væl verða, at hann framyvir verður ein stórur stykur.

Fýra reyð kort innan hálvan minutt av effektivari spælitíð kundu viðvirkað, at talan gjørdist um ógvusligt spæl seinastu løtuna, men soleiðis gjørdist tíbetur ikki. Kyndilsmenn tímdu ikki at overva seg, og tjaldursmenn ásannaðu, at teir longu høvdu tapt slagið, so seinasta løtan varð hóast alt bert ein avgreiðsluspurningur.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Bjarni Wardum 12(6), Hans Áki Dal Christiansen 7, Heini Bendtsen 6, Uni Wardum 5(1), Janus Einar Sørensen 5, Jónleif Sólsker 2
Tjaldur: Sverri Justinussen 8(1), Zoran Sarcevic 5(4), Mortan Hansen 4, Dánial Kjærbo 3, Dejan Macict 3, Svein í Heiðunum 1, Tummas Magnussen 1
Brotskøst: Kyndil 8, Tjaldur 8
Útvísingar: Kyndil 5, Tjaldur 7
Diskvalifikatiónir: Kyndil 1 (3X2 minuttir), Tjaldur 3 (1 beinleiðis reytt og 2 ferðir 3X2 minuttir)
Dómarar úr StÍF: Pole Hansen og Sverri Justinussen. Fýra reyð kort og 16 brotskøst ljóðar ógvusligt, men sum so var tað mesta av hesum í lagi. Høvdu alla tíðina gott tak í dystinum, uttan at stórvegis orsøk var til atfinningar.



*Rættiligt lív kom í áskoðarafjøldina, tá dómararnir innan hálvan minutt høvdu reyða kortið á lofti fýra ferðir*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

VÍF-Neistin 27-24 (12-14)

## Neistin misti stigini

**VÍF tykist í løtuni at vera í einum lítlum aldudali, men teir megnaðu kortini at hála sigurin heim móti Neistanum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

At VÍF skuldi fáa ein truplan dyst móti Neisjørt ikki væntandi, men veruleikin er nú tann, at vestmenningar í dag munnu vera sera fegnir um, at tað eydnaðist teimum at toga sigurin heim.

Megin partin av dystinum var tað nevnliga Neistin, sum hevði leiðsluna, og hóast VÍF vann seg fram um í seinna hálvleiki, so megnaðu gestirnir enn eina ferð at svar aftur, soleiðis at teir vóru framman fyri, tá bert fáir minuttir restaðu at leika.

Seinastu sjey minuttirnar av dystinum fingu gestirnir tó einki mál, og tá vestmenningar samstundis fingu fýra, so fingu teir hóast alt tey bæði stigini, sum eru so týdningarmikil í oddastríðnum.

### Trupult móti meistarunum

Eftir dystin fingu vit orðið á Áka Olsen, sum í fjør var við til at vinna FM-heitið til Neistan, og hann ásannaði, at teir so avgjørt ikki høvdu havt nakran lættan dyst.

– Tað er sjálvandi altíð torført at spæla móti føroyameisatarunum, sigur Áki smílandi, emn ásannar samstundis, at spælið hjá oddaliðnum ikki var nóg gott hendan dagin.

– Tað gekk illa hjá okkum, og vit ongantí okkara spæl at koyra. Sjálvandi komst hetta eisini av, at Neistin spældi ein góðan dyst, og eisini stóð Lars væl í málinum, har hann bjargaði fleiri royndum, tá vit høvdu spælt okkum ígjøgnum.

– Hevði Martin (Hummeland) ikki verið so skarpur, so eri eg als ikki vísur í, at vit høvdu vunnið dystin, men tíbetur megnaðu vit at fáa stigini til høldar.



*Áki Olsen var fegin um, at tað eydnaðist VÍF at toga sigurin heim, hóast spælið ikki koyrdi nakað serligt hjá oddaliðnum*
*Savnsmynd*

### Langur vegur eftir

Tepri sigurin á Neistanum prógvaði kanska eisini, at tað als ikki er so víst enn, at VÍF kann kalla seg føroyameistara, tá árið er av, og Áki er so heldur ikki ósamdur í hesum.

– Nei, har er langur vegur eftir enn. Vit hava nú dystir móti bæði strandingum og Kyndli, og tað er heilt víst, at spælið skal broytast, um vit skulu vinna teir dystirnar, sigur Áki Olsen at enda.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VÍF: Martin Hummeland 7, Sámal Joensen 6, Áki Olsen 5, Johnny Joensen 4, Ingi Olsen 2(1), Rógvi Nielsen 1, Agnar Joensen 1, Petur Fr. Joensen 1
Neistin: Áki Mørk 6(2), Ræni Slættanes 5, Ári Rouch 4, Rune Møller 4, Ragnar Zachariasen 3, Karl O. Rasmussen 2
Brotskøst: VÍF 2, Neistin 3
Útvísingar: VÍF 3, Neistin 7
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

gult cyan magenta svart